Røktar- & Umlættingarheimið

Lágargarður

## Starvsfólk til Røktar- og umlættingarheimið Lágargarð

**Til køkin:**
Søkt verður eftir tveimum hjálparfólkum við serligum áhuga og hegni at arbeiða í køki og at hjálpa til við døgurðaútkoyringini til uml. 120 heimabúgvandi pensionistar.

Lønarbrøkur ávikavist 0,7 og 0,6.

Arbeiðstíðin er frá kl. 07-15 og uml. 3 hvørt vikuskifti. Løn sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

**Til Miðstovu:**
Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingi í farloyvisstarv í skiftandi vaktum í lønarbrøki 0,7 frá 1. oktober 2007 til 31. august 2008.

Løn sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.
Á Miðstovu eru 15 búpláss og eitt umlættingarpláss.

Væntað verður, at umsøkjarir hava góð samstarvsevnir og kunnu arbeiða sjálvstøðugt.

Meira fæst at vita um størvini við at ringja á tlf. 316788.

Umsókn til størvini við neyðugum prógvi og autorisatión skal sendast til:

**Lágargarð**
Att: Meta av Fløtum
Stoffalág 84
Postboks 1188
Fo-110 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 21. september 2007.**




Barnaverndartænastan í Tórshavnar Kommunu søkir eftir sálarfrøðingi at byrja skjótast til ber.

**Uppgávurnar hjá sálarfrøðinginum eru m.a. at**
- veita ráðgeving og vegleiðing til sosialráðgevararnar á deildini
- gera sálarfrøðiligar kanningar og metingar av børnum og ungum
- ráðgeva og vegleiða børnum, foreldrum og øðrum, ið eru um børnini í gerandisdegnum
- veita børnum, ungum og familjum sálarfrøðiliga viðgerð
- supervisera fosturforeldur, familjustuðlar o.o.

Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og verða útintar í tøttum samstarvi við hini starvsfólkini á deildini og aðrar viðkomandi samstarvspartnarar, so sum skúlar, dagstovnar, døgnstovnar, Sernámsdepilin, barnapsykiatriina og Barnatænastuna.

**Søkt verður eftir einum sálarfrøðingi sum**
- er útbúgvin cand. psych. ella cand. pæd. psych. Ynskiligt er, at tú hevur autorisatión
- hevur royndir innan arbeiði við børnum, ungum og familjum
- hevur serligan áhuga í og vitan um børn og ung við psykosocialum trupulleikum
- hevur góð evni at samstarva og at arbeiða sjávstøðugt

**Vit kunnu bjóða**
- eitt áhugavert og avbjóðandi starv bæði fakliga og persónliga
- eina vælvirkandi deild har strembað verður eftir, at arbeiði verður gjørt á einum fakliga høgum støði
- møguleika fyri at menna teg fakliga

Sum sálarfrøðingur kemur tú at starvast saman við 5 sosialráðgevum, 3 skrivarum og einum leiðara umframt einum toymi við 6 familjuráðgevum. Barnaverndartænastan skal í næstum flyta í høli saman við Barna- og ungdómsdeildini, ið veitir pedagogiska og sálarfrøðiliga ráðgeving til dagstovnaranar í kommununi. Á Barna- og ungdómsdeildini starvast frammanundan ein sálarfrøðingur.

**Setanar- og lønarviðurskifti**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya.

Starvið er fyribils tíðaravmarkað til eitt ár.

**Umsóknarfreist**
Umsókn við prógvi og øðrum viðkomandi skjølum skal vera Tórshavnar Kommunu, Postrúm 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 21. september 2007.

Meir fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðun Jensen leiðara á Barnaverndartænastuni ella Sigrun Samuelsen, sálarfrøðing, tlf. 302060.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**

ASK

## TOEFL-roynd
## leygardagin 17. november 2007 (Test of English as a Foreign Language)

Møguleiki er aftur at taka sonevndu TOEFL iBT-royndina í Føroyum.
TOEFL-royndin er ofta upptøkukrav á hægri lærustovnum í ensktmæltum londum.

Royndin verður **leygardagin 17. november 2007 kl. 14** á Fróðskaparsetri Føroya, Nóatúni 3. Freistin fyri tilmelding er í seinasta lagi 8 dagar undan royndini.

**Tilmeldingin on-line fer fram á:** www.ets.org/toefl

**Kostnaðurin er 140 USD.**

**Altjóða Skrivstovan**
tlf. 322065
ask@ask.fo
www.ask.fo

**Fróðskaparsetur Føroya**
tlf. 352500
setur@setur.fo
www.setur.fo

## VENJINGARTÍÐIR HJÁ FIMLEIKARAFELAGNUM "FLOG" FUGLAFJØRÐUR

| Lið | Venjari | Tlf | Tíðir | Dag | Stað |
|---|---|---|---|---|---|
| Foreldur/børn | Frídrikka | 592228 | 17:00-18:00 | Mánadag | Fimleikahøllin |
| Børn 5 og 6 ár | Miriam | | 18:00-19:00 | Mánadag | Fimleikahøllin |
| Talentlið Pinkur | Rannvá, Irdi, Karla, Ása | 261715/263463 | 17:00-18:00 | Mánadag | Høllin á Kambsdali |
| Talentlið Pinkur | Rannvá, Irdi, Karla, Ása | 503250/522789 | 17:30-19:00 | Mikudag | Mentanarhúsið |
| Talentlið smágentur | Sarita, Guðrun,Ása | 593383/599315 | 19:00-20:30 | Týsdag | Mentanarhúsið |
| Talentlið smágentur | Sarita, Guðrun, Ása | 522789 | 15:00-17:00 | Mikudag | Høllin á Kambsdali |
| Talentlið smágentur | Sarita, Guðrun, Ása | | 19:00-20:30 | Hósdag | Mentanarhúsið |
| 1. og 2. flokkur | Jákupbjørg | | 16:00-17:00 | Mikudag | Fimleikahøllin |
| 1. og 2. flokkur Lop | Uni | 262030 | 16:00-17:00 | Hósdag | Fimleikahøllin |
| 3. og 4. flokkur gentur | Sigrid | 582953 | 16:00-17:00 | Mánadag | Fimleikahøllin |
| 3. og 4. flokkur Lop | Dagmar | 598207 | 14:30-16:00 | Hósdag | Fimleikahøllin |
| 5. og 6. flokkur gentur | Hildur, Sonja | | 19:00-20:30 | Mánadag | Fimleikahøllin |
| 5. 6. og 7. flokkur Lop | Sæbjørn | 727018 | 20:30-21:30 | Mánadag | Fimleikahøllin |
| 5. 6. og 7. flokkur Lop | Kjartan | 258338 | 20:00-21:30 | Fríggjadag | Fimleikahøllin |
| 7. og 8. flokkur gentur | Katrin, Gunnrið | 269633/590871 | 19:00-20:30 | Hósdag | Fimleikahøllin |
| Yngri kvinnur | Sarita | 593383 | 20:30-23:00 | Hósdag | Fimleikahøllin |
| Hip hop 12-14 ár | Beinta | | 19:00-20:00 | Mikudag | Mentanarhúsið |
| Hip hop 15 og eldri | Beinta | | 20:00-21:30 | Mikudag | Mentanarhúsið |
| Lop eldri | Kjartan | 258338 | 21:30-23:00 | Mánadag | Fimleikahøllin |
| Lop eldri | Kjartan | 258338 | 21:30-23:00 | Fríggjadag | Fimleikahøllin |

**Kostnaður fyri veturin 07/08**

| | |
|---|---|
| Børn 1 tíma | kr. 350 |
| Børn 1½ tíma | kr. 400 |
| Vaksin 1 tíma | kr. 400 |
| Vaksin 1½ tíma | kr. 500 |
| Eyka lið | kr. 200 |
| Talent/kappingar lið | kr. 400 |

**Flog Fuglafjørður**
**530 Fuglafjørður**